**Fylgiskjal 1** **31. oktober 2024**

## Heilsu- og umsorganartænastan hjá Tórshavnar kommunu

## Handarastova á Lágargarði

Á heimasíðuni hjá Lágargarði er hendan lýsing av stovninum:

> "Lágargarður er eitt røktarheim í Stoffalág 84 við góðum útsýni yvir Nólsoyarfjørð. Arkitektarnir Albert Isfeldt og Gudmund Hansen hava teknað heimið, sum læt upp í september 1987.
>
> Heimið er innrættað í einari hædd við trimum búeindum og einari felagslon. Hvør eind, herundir Handarastova hevur pláss fyri 16 búfólkum. Sostatt eru 48 búpláss tilsamans á Lágargarði.
>
> Í stóru felagslonini hava vit køk, matarhøll, virkisstovu, fysioterapi, hárfríðkan, fótarøkt, samkomuhøll og rúmlig gongsøki. Her er góður møguleiki fyri rørslu, bæði innan- og uttandura, til gongu og í koyristóli, tí ongar trappur ella gáttir forða, og framvið vegginum eru handlistar at halda sær í.
>
> Uttanfyri er sera heimligt við góðum atkomumøguleikum og prýðiligum urtagørðum uttan fyri hvørja lon. Uttanum heimið eru smáar hugnaligar gøtur, ið binda Lágargarð og Boðanesheimið saman.
>
> Á Lágargarði leggja vit stóran dent á, at tú sum búfólk varðveitir tínar førleikar og eginumsorgan so leingi sum gjørligt. Vit hava nógv ymisk serkøn starvsfólk, og í samráð við teg royna vit altíð at gagnnýta tvørfakligu møguleikarnar, sum eru til staðar á Lágargarði."

Á heimasíðuni sæst eisini, at eldrapolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu, og harvið eisini Lágargarði, hevur til endamáls at tryggja eldri borgarum eitt gott lív. Til dømis, tá borgarar í kommununi hava tørv á hjálp frá Heilsu- og umsorganartænastuni. Politikkurin er býttur upp í seks partar og fevnir millum annað um heilsurøkt og umsorgan, heilsustimbran og fyribyrging, bústaðarviðurskifti og samstarv við eldri borgarar.

Handarastova er ein av eindunum á Lágargarði og hevur 16 búpláss ætlaði fólki við demens.

Sambært yvirlitinum frá stovninum frá februar 2024 arbeiddu 40 fólk á Handarustovu: seks sjúkrarøktarfrøðingar, íroknað deildarleiðara og varaleiðara, 10 heilsuhjálparar, 24 hjálparfólk.

## Samanumtøka og tilmæli

Hølini, har Handarustovu er, vórðu upprunaliga ikki bygt við serligum atliti at fólki við demens. Broytingar eru gjørdar og framvegis verður arbeitt við broytingum eftir tørvi og stovnurin roynir í sambandi við innrætting at taka serlig atlit at demens. Við útgangsstøði í hesum er tað samanumtikið fatanin hjá umboðsmanninum, at talan er um ein stovn, ið hevur rímiliga góðar karmar til sítt virksemi. Eisini er tað fatanin hjá umboðsmanninum, at stovnurin hevur ein starvsfólkahóp við neyðugari fakligheit at taka sær av búfólkunum á Handarastovu. Arbeiðið tyktist væl skipað við stórum denti lagdum á, at talan var um búfólk, sum hava demens av ymiskum slagi, at halda tey virkin eftir evni, eins og at geva teimum innihaldsríkar dagar. Umboðsmaðurin hefti seg í hesum sambandi eisini við, at flestu av teimum avvarðandi søgdu seg vera væl nøgd við tænastuna, ið Handarastova veitti búfólkunum.

Grundað á samrøðuna við leiðsluna á stovninum, samrøðu við tey avvarðandi, skjøl, ið umboðsmaðurin hevði fingið útvegað frá stovninum, hevði umboðsmaðurin soljóðandi viðmerkingar og tilmæli.

**Samstarvsráð**: Av upplýsingunum frá leiðsluni framgekk, at í eina tíð hevði samstarvsráðið bert verið partvíst mannað, og at ráðið ikki var aktivt í løtuni. Umboðsmaðurin vísti á, at tað, sambært § 15 í Eldralógini, er eitt lógarkrav, at velja eitt samstarvsráð á hvørjum røktarheimi, sum hevur til endamáls at tryggja samstarvið millum búfólk, avvarðandi og heimið. Umboðsmaðurin heitti tí á leiðsluna fyri Lágargarð um at velja og skipa eitt samstarvsráð fyri stovnin.

**Trygd, møguligur harðskapur**: Í sambandi við umrøðu av spurninginum um harðskap á stovninum, vísti umboðsmaðurin á, at verbalar hóttanir eisini kunnu fatast sum harðskapur, og fyri trygdina og trivnaðin hjá starvsfólkum var neyðugt at hava fokus á slíkar støður og skráseta tær, tá farið varð út um mark.
Umboðsmaðurin mælti til, at starvsfólk eisini fáa læring í at handfara og at steðga verbalum harðskapi.

**Trygd, tvingsil**: Leiðslan upplýsti, at á Handarustovu hava tey í nøkur ár havt serliga upplatingarskipan við eini kotu til hurðina til stovnin, tí ávísur vandi var fyri, at fólk rýmdu. Nøkur búfólk høvdu kotu til hurðina.
Hendan skipan varð stutt fyri vitjanina hjá umboðsmanninum avtikin. Hetta varð gjørt eftir samtalu við Føroya Kærustovn, sum umsitur loyvisskipanina í Tvingsilslógini. Eftir vitjanina hjá umboðsmanninum var ístaðin søkt um peiliskipan og/ella ávaringarskipan (ein gps'ari við ávaringarskipan). Søkt var til fýra persónar, og hevur Føroya Kærustovnur nú givið loyvi til hesar tvingsilsfyriskipanir.

Umboðsmaðurin gjørdi vart við, at Tvingsilslógin varð sett í gildi 1. januar 2021. Hurðalæsing er at meta sum ein forðing í eginfrælsi og er eitt tvingsilsinntriv, sum krevur góðkenning í mun til einstaka persónin, sum verður forðaður av serligu upplatingarskipanini.

Umboðsmaðurin undraðist tí á, at leiðslan/stovnurin ikki hevði ráðført seg um hesi viðurskifti fyrr enn í sambandi við vitjanina frá umboðsmanninum.
Nú serliga upplatingarskipanin til hurðina til Handarustovu varð tikin burtur, og søkt var um góðkenning av tvingsilsfyriskipan í mun til einstøk búfólk, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við hesa ítøkiligu støðuna. Umboðsmaðurin minti tó á, at tað ikki er heimild at seta tvingsilsinntriv í verk uttan fyrst at søkja um loyvi til tað frá Føroya Kærustovni, og at inntrivini eiga at verða rættaði móti einstaka persóninum og ikki øllum búfólkunum sum ein samlað eind.

**Viðvíkjandi útlendskari arbeiðsmegi**: Nøkur avvarðandi góvu til kennar ávísan ótryggleika av, at starvsfólk vóru á vakt, sum ikki skiltu ella tosaðu føroyskt. Frá leiðsluni á stovninum varð greitt frá, at nøkur starvsfólk vóru, sum ikki skiltu ella tosaðu føroyskt, men at tey vóru tilvitaði um, at hesi skuldu arbeiða saman við fólki, sum tosað føroyskt. Leiðslan helt tískil, at hetta var ikki nakar aktuellur trupulleiki.
Umboðsmaðurin vísti á, at fyri búfólkini og trygdina á stovninum, er týðandi, at tað altíð eru starvsfólk til staðar á deildini, sum kunnu samskifta á máli, sum búfólkini skilja.

**Viðv. bygnings- og hølisumstøðunum**: Undir vitjanini varð víst á ávísar smávegis tiltrongdar umvælingar. Heilsu- og umsorganartænastan hjá Tórshavnar kommuna hevur greitt frá, at arbeitt verður við einum uppskoti um heildarætlan viðv. høvuðsumvæling av Lágargarði. Heildarætlan við tíðarætlan og kostnaðarmeting skuldi eftir ætlan verið klárt til støðutakan í september 2024. Umboðsmaðurin tekur til eftirtektar, at tað sostatt verður arbeitt við at gera neyðugu umvælingarnar.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður